# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Færri stjórnarráð

Við nýggju stýrisskipanarlógini varð stjórnarskipanin broytt. Landsstýrið, sum hevði verið eitt sonevnt kollegialt stýri, har allir limir høvdu ábyrgd í felag, var broytt til eina stjórn, har hvør landsstýrismaður sær fekk ábyrgd av sínu málsøkjum mótvegis løgtinginum.

Henda nútímansgerð skuldi geva okkum eina meira nútíðarhóskandi almenna fyrisiting og betri rættartrygd. Politiska valdsjavnvágin varð eisini broytt til fyrimunar fyri landsstýrið og miðfyrisitingina. Løgtingsins ávirkan á fyristingarligar avgerðir varð munandi minkað og sjálv lóggávutilgongdin gjørdist trek og tung. Sum ein avleiðing av hesum broytingum fingu vit ta sonevndu FNC skipanina uppkallað eftir donskum serfrøðingi, sum fekk púra fríar hendur til at umskipa alla landsstýrisfyrisitingina. Úrslitið gjørdist ein ovurstórur almennur yvirbygningur, sum javnt og samt økist sum við knubbanøring. Parkinsons lóg tykist vera galdandi her sum alla aðrastaðir: almenn fyrisiting hevur lyndi til at veksa ótálmað orsakað av ávísum viðurskiftum í sjálvari fyrisitingini.

Í sambandi við, at límið í ávegis kreppupakkanum er loysnað, hevur fíggjarmálaráðharrin luftað nøkrum tonkum um almennu fyrisitingina. Við hesum nemur fíggjarmálaráðharrin við eitt eymt punkt í samfelagnum. Ein stór almenn fyrisiting er í sjálvum sær eingin trupulleiki, so leingi borgarar og vinnulív kenna, at fyrisitingin er til gagns fyri allar partar. Men fær almenningurin eina kenslu av, at fyrisitingin í ein ávísan mun er til fyri sína egnu skuld, so fellur undirtøkan í almenninginum fyri hesum yvirbygningi.

Tað er við hesum bakstøði, vit eiga at meta um hugskotið at minka um talið av stjórnarráðum. Spurningurin er, um tíðin ikki er komin til at royna ein øvugtan FNC. Eiga vit ikki at nýta høvið til at yvirhála alla almennu miðfyrisitingina og kanna eftir, um vit nú fáa nóg mikið fyri peningin. Er ikki okkurt, sum kann gerast bæði bíligari, einfaldari og enntá betri? Kundu vit ikki havt færri stjórnarráð? Er veruliga brúk fyri trimum eftirlitsstovnum? Hvør hevur veruliga valdið við hesum fyrisitingarbygnaði? Er hann hóskandi til okkara lítla samfelag? Hvørjar dupultfunktiónir eru? Eru tað í roynd og veru embætisfólk og ikki politikkarar, sum hava valdið. Hvør hevur størri vald – ein landsstýrismaður ella ein aðalstjóri? Hvussu við spunasmiði og í hvønn mun verða embætisfólk, ið skulu vera púra politiskt uttanveltað og óheft, nýtt sum spunasmiðir? Hvussu er almenna tænastustøðið samanborið við grannalondini? Hvørjar almennar uppgávur kunnu vit útlisitera? Hvørji øki skulu gerast kommunal og hvørji skulu verða verandi landsmálsøki? Hesar og mangar aðrar spurningar eiga vit nú at fáa svaraðar. Vit eiga samstundis at spyrja um ikki ein samanlegging av stjórnaráðum hevði gagnað. Talið av stjórnarráðum er jú ásett meira fyri at fáa politiska kabalu at ganga upp enn av fyriliti fyri tænastustøði og rættartrygd. Hví ikki fimm ella trý stjórnarráð?

**Sosialurin**

## Svar uppá tunnils søluna í Fuglafirði



**JÓHAN HERI JOENSEN**

Fyri einum góðum mánaða síðani hevði eg eitt lesaraskriv í bløðunum um ætlaðu søluna av tunlunum í Fuglafirði.

Eg havi við vilja givið teimum, sum vóru biðin um at svara, sera langa tíð til umhugsunar. Eisini havi eg (face to face) spurt Kristinu, um tær ætlað at svara borgaranum, men undanførslan er: at ov nógv varð at gera í løtuni, tí vóru ikki stundir til at svara (bert 1 góður mánaður).

Satt at siga, so roknaði eg eisini við onkrari bíligari undanførslu.

Tíverri bleiv tað tí soleiðis, at eg verið noyddur sjálvur at svara mínum egnu spurningum.

Til valið profilieraði Kvinnulistin seg við, at tær skuldu syrgja fyri at betri innlit fekst í kommunalt arbeiði, og at heimasíðan varð rættað amboðið til hesa uppgávu. Lítið og einki hava vit merkt til hesið lovorð, og heimasíðan tykist liggja í "coma" - uppdateringar eru vist, í hesum høpi, ein býur í Kina.

Tað varð veruliga grundin til, at eg heitti á býráðslimirnar á kvinnulistanum at svara spurningunum sum settir vóru, tær kundu tá í verki víst, at verðuleiki varð tengdur at givnum lyftum.

Sum nevnt varð í fyrra lesaraskrivið, so er havnalagið í Fuglafirði í høvuðsheitinum bygt á tann hátt, at sprongt er niðan í bakkan og grótið er nýtt til ífyllu, lendi sum við hesum varð skapt, við spreinging og ífylling, verður síðani leiga út og kann ikki keypast.

Tunlarnir eru eisini sprongdir inní lendi, og grótið er eisini í hesum føri nýtt til ífyllu. Installatiónir og annað hava tey virkir sum leiga sjálvið gjørt. Kommunan hevur bert gjørt lendi.

Kommunan hevur skapt fortreytirnar, sum aðrastaðni á havnaøkinum, og einki annað.

Verður gingið burtur frá prinsippinum at leiga lendi út, men í staðin selja, so er sama mannagongd val saktans eisini galdandi aðrastaðni á havnaøkinum.

Svar uppá spurningarnar sum settir vóru:

Tunlarnir við felagstunli kostaðu 26 mill. at gera.

Ætlanin hjá býráðnum er, at møguligir keyparar ikki skulu gjalda sín part av felagstunlinum.

Einki lán er í tunlunum.

Kommunan fær árliga 960.000,- kr. í leiguinntøku fyri tunlarnar

29. nov 2007 varð viðtikið at selja tunlarnar 1 – 3 og 5 fyri 4 mill. t.v.s. 1,3 mill pr. stk.

Sitandi býráð hevur einmælt viðtikið at selja hesar 3 tunlarnar fyri 4 mill.

Kommunan sigur eina av orsøkunum til at seljast skal er, at teir meta tað verða kappingaravlagandi at eiga.

29.nov 2007 sótu hesi í fíggjarnevndini
Fíggjarnevndin:
Sigurd Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Elisabeth Eldevig.

Feløg sum eiga Bergfrost eru:
P/F Framherji
P/F Havsbrún
P/F Faroe Ship
P/F Vónin

Nevndin í Bergfrost:
Elisabeth Eldevig, formaður
Unnar Jónsson
Jóhanna á Bergi
Hjalmar Petersen

Fuglafjarðar býráð í dag:
Í samgongu:
Sigurð Simonsen
Dánjal Vang
Jan Toftegaard
Eyðun á Lakjuni
Kristina Larsen
Elisabeth Eldevig

Í andstøðu:
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni
Magnus Midjord

**Samanumtikið:**
At sami persónur framgongur allastaðni sum lyklapersónur, má sigast vera sera óheppið, serliga táið talan er um "dumpingsølu".

Tað er eisini ein møguleiki, at fleiri enn Elisabeth eru ógegniðir at taka avgerð í hesum málið.

NB: Tað er skylda hjá viðkomandi persónum at siga frá um so er.

At byggja allar tunlarnar kostaði 26 milliónir (fyri uml. 20 árum síðani).

Eitt samt býráð hevur kalkulerað at selja 3 tunlar fyri 4 milliónir ella 1,3 mill pr. stk.

Um so er at hesir 3 verða seldir fyri 4 mill. So eru bert 2 teir minstu eftir, sum tá ikki kunnu virðismetast meira enn 700.000,- kr. pr stk.

Virðismeting í sølutilgongdini verður tí í mesta lagi 6 milliónir (fyri allar tunlarnar).

Borgarin skal tá bera tær 20 milliónirnar. (Um hetta ikki er kappingaravlagandi, og ein beinleiðis stuðul til vinnuna, so veit eg ikki).

Men, vit eiga eisini at hava í huga, at tað eru uml. 20 ár liðin síðani tunlarnir vóru gjørdir, so tær 26 milliónirnar eiga um rætt verður atborðið, at uppskrivast til dags virðið. Hesa uppskriving eigur borgarin at leggja omaná varðisligu metingina. Um kaldur og kyniskur roknskaparháttur verður nýttur, eru tunlarnir verdir millum 30 – 40 mill. Hesar tunlar vil kommunan selja fyri 6 mill.

Um nakar skal skýrast ársins jólamaður, so má heiðurin falla til Fuglafjarðar kommunu.

NB:
At allir 9 limirnir eru farnir undir veingirnar hjá Fólkaflokkinum, og treytaleyst gevur vinnulívinum, í røttum fólkafloksanda, loyvi at neyðtaka ognirnar hjá borgarunum, boðar ikki frá góðum.

Samstundis hveppur kommunan seg við at geva, verðuliga tilfeinginum, barnaskúlanum sømulig kor. Bygningurin hjá barnaskúlanum í Fuglafirði, hevur tann ivasama heiður, at verða so nógv tann vánaligasti á Føroya landi, samstundis sum kommunan ger seg til reiðar at forera kommunalar ognir fyri spottprís. Hettar má fáa aðrar borgarar at reisast úr stólinum.

Tað undrar meg, at eitt samt býráð, so ábyrgdarleyst umsitur borgarans ognir

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.